nøvn

Lesarabrøv



Góði Aksel
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum 1. juni, ynskir
Helena

Landsstýrið og løgtingið skyldina av støðu SIT-næminganna

Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag hava fyri meira enn einum ári síðan gjørt landsstýri og løgtingi greitt, at SIT-útbúgvingin ikki fór at verða góðkend av vinnuni.

Føroya Handverksmeistarafelag (FHMF) hevur um dagarnar sent út fráboðan um, at handverkaralærlingar ikki verða tiknir í læru, og at støðis útbúgvingin innan tøkni (SIT-útbúgvingin) ikki verður góðtikin sum partur av handverkaraútbúgvingini. Eisini eru myndugleikarnir gjørdir vargugir við, at vandi er fyri, at føroyska handverkaralæran framyvir ikki fer at verða góðkend í Danmark og heldur ikki í øðrum londum. Føroya Handverkarafelag (FHF) tekur undir við støðutakan meistarafelagsins.

Feløgini hava sagt frá

Orsøkin til hesa støðu er tann, at viðtiknar eru løgtingslógir um SIT- og handverkaraútbúgvingar uttan at vinnan, har hesir næmingar/lærlingar eftir lokna útbúgving skulu starvast, er so frægt sum eftirspurd.

Sambært fjølmiðlarnar tykist henda støða at koma óvart á næmingar, lærarar á teknisku skúlunum og myndugleikar. Men hetta átti ikki at verið so. Tí longu áðrenn lógin um SIT-útbúgvingina varð samtykt í løgtinginum í apríl 1992, sendu FHMF og FHF løgtingsins skúlanevnd skriv við avriti til allar flokkar og Maritu Petersen, táverandi landsstýrismanni í útbúgvingarmálum, har greitt varð sagt frá, at SIT-útbúgvingin ikki fór at verða góðkent av handverkarafeløgunum.

Feløgini vendu sær til skúlanevndina, hóast tey ikki vórðu eftirspurd, og hóast landsstýrið í viðmerkingum til lógaruppskotið segði, at hetta lógaruppskotið (SIT) ikki var eitt uppskot um yrkisútbúgving. Lógin varð kortini samtykt.

Men nú, tá ið næmingarnir eru við at hava lokið 2. skeið av SIT-útbúgvingini, visir tað seg, at talan kortini er um yrkisútbúgving, og noyddist løgtingið einaferð afturat at samtykkja eina lóg um yrkisútbúgving. Hetta framhaldið av SIT-útbúgvingini góðkennir vinnan heldur ikki.

»Rukkur«

Eru SIT-næmingarnir »hildnir fyri rukku«, hava SIT-næmingar tikið eina útbúgving til fánýtis, og eru SIT-næmingar sleptir upp á fjall, so er skyldin hvørki meistarafelagsins ella hansverkarafelagsins. Skyldin er heldur ikki stjóra Tekniska skúlans í Tórshavn, sum í hesum føri einans hevur til uppgávu at umsita eina lóg. Øsingin er ikomin av, at stjórin á Tekniska skúla í Tórshavn í »Degi og viku« hevur upplýst, at næmingarnir fóru at enda í eini blindgøtu, av tí at útbúgvingin ikki fór at verða góðtikin av vinnuni.

Myndugleikarnir hava skyldina

Tað er tí eina og aleina fyrrverandi landsstýrismaður í útbúgvingarmálum, landsstýrið og løgtingið, sum hava alla skyldina av hesi harmiligu støðu.

Somuleiðis hevur Landsskúlafyrisitingin sína stóru skyld, tí hon ikki hevur sagt SIT-næmingunum frá, at útbúgving teirra ikki fór at verða góðkend av handverksvinnuni.

•

28. mai 1993
Føroya Handverksmeistarafelag
Vilhelm M. Johannesen, formaður

Føroya Handverkarafelag
Høgni Højgaard, formaður



Góði Alvur
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 29. mai.
Heilsan, mamma, babba og Hans

LEIKUM FAGURT – Eisini rundan um fótbóltsvøllin

Tann 29. mai 1993, hvitusunnuaftan, var undirritaði við einum fótbóltsliði í piltadeildini – dreingir 10/12 ár – í Klaksvík, har teir skuldu leika landskappingardyst.

Við vøllin í Klaksvík veittraðu tvey fløgg, K.Í. flaggið og tað gula Fair Play – ella Leikum Fagurt-merkið. Eitt tað fyrsta, mær rann til hugs, tá eg sá hetta flaggið í Klaksvík, var, at kanska fór hetta at gerast ein øðrvísi framførsla, enn tá somu liðini hittust í Havn í fjor.

Tá hendi nevniliga tað, sum ikki átti at hoyrt til í ítróttí yvirhøvur, at ávísir áskoðarar hjá gestaliðnum beinleiðis eggjaðu spælarum sínum – framvegis dreingir í 10/12 ára aldri – at fara sum harðast fram móti mótstáðumonnunum. Og onkur tók tá við ráðum, tí ikki var sørt, at summir grótu, aðrenn dystur var liðugur. Ta ferðina talaði eg harðliga at teimum, sum uttan fyri stóðu, soleiðis at ikki skuldi vera ivi um, hvat hildið varð um slíkt. Og um tað hevur gjørt mun ella ikki, veit eg ikki at siga, men í Klaksvík seinna dystin í fjør gekk fyrimyndarliga. Tann dystin vann K.Í.

Og so koma vit til Klaksvíkar í ár og siggja gula flaggið. Men fý for ólukkan fyri áskoðarar. Har stóðu tilkomnir menn – kanska pápar, kanska abbar at spælarunum – og rópti á hesar smádreingirnar um at: »Hegla kleyvarnar undan teimum«, »Jarðlegg handan har, hann er nógv for gamal« og annað tílíkt. Til spælaranna rós skal sigast, at teir gjørdu tað ikki. Teir spældu fótbólt, sum teir vónandi fara at vísa hann eisini í framtíðini. Halda teir seg til tað, sleppa teir kanska undan kortum og karantenum, og kunnu vísa øðrum á, at tað ber væl til at spæla fótbólt uttan harðskap.

Men verða dreingirnir vandir upp frá smáum av í slíkum anda, sum hesir áskoðararnir vístu hendan hvítusunnuaftan í Klaksvík, so má Gud forbarma seg yvir føroyskan fótbólt.

Tað er ikki sannlíkt, at hetta er tann vanligi atburðurin millum fótbóltsáskoðarar í Klaksvík, men tað eina rotna eplið kann sum kunnugt oyðileggja alla tunnuna. Og tendensurin frá seinasta ári var rættiliga lættur at kenna aftur.

Til seinast kann nevnast, at útiliðið vann 4–1 á einum K.Í. liði, sum hóast slíkar áheitanir ikki læt ónollurnar taka yvir.

Edvard í Skorðini Joensen

Arbeiðsloysi

Í Sosialinum 29. mai setir P. Joensen mær tríggjar spurningar í sambandi við mína greinarøð: »Arbeiðsloysi, hvat er tað?«

1. Er Tormóður Dahl arbeiðsleysur?

Svarið her er bæði »ja« og »nei«. Spyrt tú um eg havi arbeiði, ið tryggjar mær fasta løn hvønn dag, so er svarið, at tað havi eg ikki. Í greinarøðini royndi eg at vísa á stóra týdningin av at vit dugdu at skilja millum »arbeiðið« (tvs. tað vit avrika), og tað okkum tørvar fyri at liva eitt manssømuligt lív. Ein heimagangandi húsmóðir við fleiri børnum »avrikar« óivað eitt týdningarmeira arbeiði enn t.d. ein almennur fulltrúi, ið er tryggjaður 25/30.000 kr. um mánaðin. Húsmóðurin fær sum kunnugt ikki eina krónu fyri tað, hon avrikar – hana hevur okkara sonevnda demokrati sum kunnugt slept upp á fjall. Sjálvur eri eg mín egni arbeiðsgevari – viðhvørt verður tað eg avriki lønt, viðhvørt ikki.

•

2. Fær Tormóður Dahl stuðul frá Arbeiðsloysistryggingini?

Her er svarið »nei« – og um ikki ber til at spenna verandi lívreim longur inn, so vóni eg allíkavæl tað fer at eydnast mær at finna útvegir.

3. Hvussu skulu tey (familjur við børnum), ið hava mist penning av skipaførlogum í 80-unum, klára seg við stuðli frá Arbeiðsloysistryggingini?

Okkara fólkavaldu tykjast nú at skilja, at fólksins bráðneyðugu trupulleikar mugu oysast **fram um** trupulleikarnar hjá ávísum stovnum og skipanum, ið vit meira og minni kunnu vera fyri uttan. Eisini er at vóna, at tey fáu fiskavirkini, ið nú verða eftir, fáa eina so mikið framkomna leiðslu, at tey megna sjálvi at selja sínar framleiðslur og sostatt spara meginpartin av teimum 75/100 mió. kr. árliga, ið Fiskasølan skuldi havt fyri at selja vørurnar. Annars mugu vit øll bert ásanna, at við galdandi arbeiðsloysisskipan, og so sum vit hava bygt okkara samfelag upp (stór hús, sjónvarp, video, upptøkutólk, parabolantennur, bil, uppvaskimaskinur, nýtsluvørur í einaferðs innpakking, mynstrut wc-pappír o.s.fr.), so er tað ógjørligt hjá tí arbeiðsleysa at fáa endarnar at møtast, uttan at skuld hansara verður niðurskrivað. Heilt absurdur er eisini bert tankin um, at allar heimsins menniskjur skulu hava sama livifót sum vit í Vesturheiminum, tí tað hevði m.a. kravt eina orkuframleiðslu, ið heimurin ikki á nakran hátt hevur møguleika at ganga á møti. – Og um so var, so vildi dálkingin bert frá teimum 100-tals mió. nýggju bilunum, vit tá fingu, lagt heimin í oyði eftir bert fáum árum.

»Men henda vitan hjálpir ikki upp á støðuna hjá okkum í dag«, vilt tú helst siga. Tað er satt, men vitanin kann í hvussu so er hjálpa okkum at skilja, at vit mugu læra okkum at hugsa í heilt øðrum ræsum enn higartil, skal gongd koma í aftur so tað munar – **eisini** fyri komandi ættarliðini. Eitt er í hvussu so er givið: **Mikkelsen-loysnin kemur at køva seinastu leivdirnar av tí, ið eftir er av sonnum framtakshuga í landinum. Loysnin kann best sammetast við ein okeypis ferðaseðil á fyrsta plássi við »Titanic«.** – Eitt eru ávísar sjálvbodnar, skilagóðar samanleggingar/samskipanir, men eitt miðstýrt búskaparliv er »náttúruneyðugt« dømt til undirgang – tað hava allar royndir sýnt (Sovjet, Eysturlondini, Føroyar o.s.fr.), og tað verður tí eisini úrslitið av Mikkelsen-loysnini. Danmark telst milium tey mest tekniskt/búskaparliga framkomnu londini í heiminum, so danir vita sjálvandi alt um hetta. Tí má tað undra, at teir her krevja loysnir, teir undir ongum umstøðum vildu valt í egna landi. Er tað kanska ein staðfesting av at føroyingum tørvar »heilakapasitet«, ella byr okkurt annað (undirgurndin) undir?

Eina so við og við – t.d. 2–3 ár – uppbygd **treytaleys** minstulønarskipan (arbeiðsloysistryggingin fellur tá burtur) og eitt búskaparliv, ið (við ábyrgd) »stýrir sær sjálvum« innan ávísar karmar ásettar av løgtinginum, er ein leiðin, vit mugu ganga, skulu vit fóta okkum aftur á ein manssømuligan hátt.

Hetta var m.a. tað eg eftir førumuni royndi at vísa á við mínari greinarøð.

Tormóður Dahl

BRÚKTIR BILAR!

Vit hava fleiri góðar brúktar bilar av ymsum merkjum sera bíliga og lagaliga til sølu.

Ynskja tygum at sýna /royndarkoyra teir, kann hetta avtalast á tlf.: 18903.

v/ Atla Klein Olsen
Rann Teld Postboks 205
110 Tórshavn
Fax.: 18703
Tlf.: 18903 – 88903